## Fagraberg, Høgaberg og Saksaberg landa í Noreg

Føroysku sildaskipini fáa fitt av sild. Fagraberg boðaði frá landing kl. 6 í morgun, teir hava 700 tons av sild, sum verður landað í Måløy. Høgaberg boðaði frá landing um 9 tíðina í morgun, teir hava 550 tons, sum eisini verður landað í Måløy. Seinni í dag boðaði Saksaberg eisini frá landing í Norra, teir hava 400 tons, sum verður landað í Moltu. Tað kemur nógv sild upp á land í Norra, bara í dag hava 30 sildaskip boðað frá landing.

## OPEC framskundar kreppufund

OPEC-londini fara at tosa um, hvussu fíggjarkreppan ávirkar oljuprísin. OPEC-londini boðaðu herfyri frá, at tey fóru at halda fund um fíggjarkreppuna miðskeiðis í november, men nú er fundurin framskundaður og verður tann 24. oktober. Í einum tíðindaskrivi sigur OPEC, at felagsskapurin stúrir fyri avleiðingunum av búskaparkreppuni, og hvussu kreppan ávirkar prísin á ráolju. Kreppufundurin hjá OPEC verður í Wien.

# Størri kvotur eystanfyri

**Noreg og Russland hava ásett størri kvotur eystanfyri næsta ár, og harafturat verður aftur læoyvt at fiska lodnu**

FISKIVINNA
*Árni Joensen: arni@sosialurin.fo*

Semjan millum norðmenn og russar ber í sær, at næsta ár verður loyvt at fiska 525.000 tons av norskarktiska toskinum, hýsukvotan verður 194.000 tons, og fyri fyrstu ferð síðani 2003 sleppa skip aftur at fiska lodnu. Kvotan í 2009 er sett til 390.000 tons. Harafturímóti verður tað framvegis ikki loyvt at fiska svartkalva.

Nýggja ásetingin ber millum annað í sær, at norsk skip slepa at fiska meiri tosk og hýsu umframt lodnu, og sambært norskum fjølmiðlum er talan um eitt avreiðingarvirði millum eina og hálva aðru milliard krónur.


*Helga Pedersen er norskur fiskimálaráðharri*
*(Mynd: Ap)*

Norski fiskimálaráðharrin, Helga Pedersen, sigur við fjølmiðlarnar, at kvotuhækkingin fer at geva størri virksemi og betri lønsemi í einari tíð, sum er merkt av óstøðugum fíggjarviðurskiftum. Ráðharrin leggur afturat, at hetta er serliga týðandi fyri eina vinnu, sum dúvar upp á útflutning, og sum tí er ávirkað av búskapargongdini uttanlands eins væl og heima.

- Eg haldi, at hetta er eitt týðandi tekin at senda fiskivinnuni, sum hevur stúrt fyri framtíðini, sigur Helga Pedersen.

### Stór hækking

Norski fiskimálaráðharrin sigur, at kvoturnar fyri 2009 eru innan fyri tað, sum er lívfrøðiliga ráðiligt, men hon ásannar, at vøksturin í toskakvotuni er oman fyri tað, sum hevur verið vanligt frammanundan. Næsta ár veksur toskakvotan umleið 20 prosent, meðan tað vanliga hámarkið frá einum ári til tað næsta hevur verið 10 prosent fyri.

Orsøkin til frábrigdið hesaferð er, at altjóða havgranskingarráðið ICES hevur mett, at tann norskarktiski toskastovnurin er munandi betur fyri, enn ráðið hevur hildið tey seinastu árini, skrivar VG. Kortini eru norðmenn og russar á einum máli um, at næstu ferð verður tað gamla hámarkið á 10 prosent sett aftur í gildi.

### Ímóti at veiða lodnu

Norsku fiskakeypararnir halda lítið um avgerðina hjá teimum politisku myndugleikunum at taka lodnuveiðina uppaftur. Fiskekjøpernes Forening sigur, at tað fer at skaða toskastovnin, um skip sleppa at veiða so nógv sum 390.000 tons av lodnu næsta ár, tí lodnan er ein so týðandi partur av føðini hjá toskinum.

Felagið sigur, at tað ber ikki til at umsita hvønn stovnin sær, men at tað er neyðugt at umsita stovnarnar sum eina lívfrøðiliga og vistfrøðiliga eind.

-Tað rætta er at varðveita lodnustovnin sum føðikeldu hjá øðrum fiskasløgum so sum toski, sigur felagið hjá norsku fiskakeyparunum í skrivi til myndugleikarnar.

Í øðrum lagi mælir felagið myndugleikunum til at áseta eina lodnukvotu millum 50.000 og 100.000 tons, og at lodnan skal brúkast til matna. Felagið sigur, at á tann hátt kann lodnan vera við til at tryggja virksemi í teimum lokalu samfeløgunum í Norðurnoregi.

# Bankarnir gera sær dælt av kreppuni

**Bankarnir misbrúka fíggjarkreppuna til at tátta rentuskrúvuna mótvegis privatum viðskiftafólki og fyritøkum**

FÍGGJARKREPPAN
*Árni Joensen: arni@sosialurin.fo*

Í seinastuni hava peningastovnarnir hækkað útlánsrentuna, og í Danmark hava fleiri bankar longu boðað frá, at teir fara at hækka rentuna uppaftur meiri í næstu viku. Hækkingin hesaferð verður upp í 0,75 prosentstig, og tað er so nógv, at bankarnir kunnu ikki brúka fíggjarkreppuna sum grundgeving. Tað halda í hvussu er fleiri vinnufelagsskapir í Danmark og danska Brúkararáðið.

- Hatta ljóðar ógvuliga dýrt. Tað tykist, sum at summir bankar gera dekan ov nógv av, og tað haldi eg vera sera óheppið, sigur Søren Nicolaisen, búskaparfrøðingur hjá danska Handverksráðnum, við kringvarpið DR. Hansara felagsskapur umboðar meiri enn 20.000 smáar og meðalstórar fyritøkur.

Útrokningar hjá einum øðrum vinnufelagsskapi, Dansk Erhverv, vísa sambært JyllandsPostinum, at rentuhækkingarnar fara at geva bankunum 1,6 milliard krónur í eykainntøku um mánaðin ella 19,2 milliardir krónur um árið. Tað er meiri enn helmingurin av tí, sum hjálparpakkin hjá stjórnini kostar peningastovnunum.

- Tað tykist, sum at bankarnir eru ógvuliga skjótir at senda brúkarum og fyritøkum rokningina, og at teir í veruleikanum gera sær dælt av støðuni. Eftir mínum tykki er tað í lagi, at bankarnir senda øðrum rokningina fyri fíggjarkreppuna, men tað eigur ikki at vera neyðugt at taka millum 30 og 40 milliardir krónur innaftur eftir bara tveimum árum, sigur Søren Nicolaisen.


*Donsku vinnufeløgini halda, at bankarnir misbrúka fíggjarkreppuna til at krevja óneyðuga høga útlánsrentu*
*(Mynd: Danmarks Nationalbank)*

### Gevur størri afturgongd

Ein avleiðing av fíggjarkreppuni er, at rentumarginalurin - munurin millum innlánsrentuna og útlánsrentuna - veksur, og Søren Nicolaisen sigur, at tað er óheppið í einari búskaparligari krepputíð, at bankarnir tátta rentuskrúvuna.

- Avleiðingin av hesum er, at tað verða gjørdar færri íløgur, soleiðis at búskaparvøksturin minkar uppaftur meiri, og tað er ikki serliga heppið - hvørki fyri fyritøkurnar ella samfelagsbúskapin sum heild, sigur búskaparfrøðingur hjá Handverksráðnum við DR